# skúma róman



*Hákun Steingrimsson og Terji Sigurðsson fingu seming millum Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag øðrumeging og fimm feløg hinumegin. Teir eru aftur nú semingsmenn millum Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini, men tá umboða teir Semingsstovnin, sum brúkar væl lægri upphæddir*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



Terje Sigurðsson
Sóljugøta 4
FO-100 Tórshavn

**Rokning**

Navn / Adressa: Fíggjarmálaráðið/ Lønardeildin, Kvíggjartún 1, Postrúm 2039, FO-110 Tórshavn, att: Snorri Fjallsbak, stjóri

Dagur: 3. december 2010

| | Lýsing | | Upphædd |
|---|---|---|---|
| 72,75 | **Rokning fyri seming** ***í tíðarskeiðnum 15. - 30.november 2010*** ***Arbeiðsgevarans partur*** Kommunala Arbeiðsgevarafelagið saman við Fíggjarmálaráðnum og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag og Starvsmannafelagið tímar 145,5 tímar tilsamans at býta við hvør sínari helvt millum FMR/KAF og Almenna Fakfelagssamstarvið | kr 1.500,00 | kr 109.125,00 |

p-tal [redacted]
Navn Terje Sigurðsson
Kontonummar [redacted]

Subtotal kr 109.125,00
Tilsamans kr 109.125,00

***Biðið verður um, at upphæddin verður flutt umvegis lønarskipanina á konto 9181 444.841.5***

*Vinarliga Terje*

ER ANNULLERAÐ
Í VERUGONGD.
SKAL SUM LØN SAMB
LØNARDEILDINA, FMR.

KOMIÐ



**FAKTURI**

ROKNING SENDAST TIL: Fíggjarmálaráðið, Lønardeildin, Att. Snorri Fjallsbak, Kvíggjartún 1, Boks 2039, 165 Argir

VØRA LATAST TIL: Sama

Fakturi nr 2010-005
Faktura dato 3. des. 2010
Kunda nr

| DAGUR | ORDRA NUMMAR | OKKARA NUMMAR | SØLUFÓLK | FRAKT | SEND VIA | GJALDSTREYTIR | LATIÐ |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | |

| TAL | VØRA | LÝSING | AVSLÁTTUR | EINDARPRÍSUR | SAMLAD |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Seming í s.v. Sáttmálasamráðingar | | | |
| 145,5 | tímar | 15. nov – 30. nov 2010 | | | |
| | | Partur hjá FMR og KAF | 50% | 1.500 | 109.125,00 |

Tilsamans **109.125,00**
TOTAL **109.125,00**

Hákun Steingrímsson
P-tal [redacted]
Blákollugøta 1
FO-100 Tórshavn

TELEFON NR +298 223031
FARTELEFON NR +298 212342
E-MAIL Hak@olivant.fo
BankNordik [redacted]

***Tað stendur svart upp á hvítt, hvør tímalønin var hjá semingsmonnunum***

# Hatta er rokningin

## SEMING Heðin Mortensen, formaður í Kommunala rbeiðsgevarafelag dugir ikki at meta, um rokningin frá semingsmonnunum er rímilig ella ei

**Randi Jacobsen**

Helvtin av rokningini frá teimum báðum semingsmonnunum skal rindast av arbeiðsgevarunum, í hesum førinum Fíggjarmálaráðnum og Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.

Teirra partur av gjalda er 236.250 krónur.

Heðin Mortsnen, formaður í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum veit ikki enn, hvussu Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag fara at býta rokningina sínamillum. Kommunala Arbeiðsgevarafelag hevur bara við tveimum av sáttmálunum at gera.

– 1500 krónur um tíman ljóðar nógv, men eg veit ikki, hvat grannskoðarar og sakførarar taka um tíman, og tí veit eg ikki um rokningin er rímilig ella ei, sigur Heðin Mortensen.

Hann nevnir, at tá ið semingsmenn verða bidnir um at gera eitt arbeiði, hevur ongantíð verið spurt um, hvat teir taka um tíman.

– Nakað annað er, at eina aðra ferð kundu vit roynt at avtala framman undan, hvør lønin skal verða, sigur Heðin Mortensen.

randi@sosialurin.fo